# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- At senda republikanararnar at rudda upp í Washington er sum at senda ein oksa inn í ein glashandil*
*Hillary Clinton*

# OPEC ætlar at skerja framleiðsluna

**- Er tað neyðugt at skerja framleiðsluna hálva aðru millión tunnur um dagin, so gera vit tað, sigur OPEC-formaðurin undan fundinum, sum verður hósdagin**

Chakib Khelil er oljumálaráðharri í Algeria og formaður í felagsskapinum hjá oljuútflytaralondunum OPEC, og hann er ikki í iva um, hvat hann og hinir ráðharrarnir fara at gera, tá teir hittast til ein framskundaðan fund hósdagin.

- Vit fara at skerja framleiðsluna, og skerjingin má vera so mikið munagóð, at hon kann tryggja javnvágina millum útboð og eftirspurning, sigur Khelil við BBC. Hann ásannar, at einki beinleiðis mark er ásett enn, men sigur tó, at er tað neyðugt at skarva 1,5 millión tunnur av dagligu framleiðsluni, so eru OPEC-londini til reiðar at gera tað.

Í summar var oljuprísurin uppi á 147 dollarum fyri tunnuna. Nú er hann fallin niður um 70 dollarar, og tað er hesum stóra prísfallinum, sum OPEC ætlar sær at steðga.

- Vit vilja hava støðugan prís, sum hvørki er ov lágur ella ov høgur, og eftir okkara tykki er tað hóskandi at hava ein prís millum 70 og 90 dollarar fyri tunnuna, sigur Khelil. Iran hevur boðað frá, at landið hevur somu áskoðan sum formaðurin, men Venesuela hevur sagt, at landið er fyri at skerja framleiðsluna meiri enn hálva aðru millión tunnur um dagin.

Chakib Khelil dylur ikki fyri, at hann vil fegin hava oljulond sum Noreg, Russland og Meksiko at skerja framleiðsluna.



*Chakib Khelil er formaður í OPEC-felagsskapinum*
*Mynd: Polfoto*



*Maðurin var stýrimaður á einum flogfari hjá United Airlines*
*Mynd: Reuters*

## Ætlaði sær á flog við kenning

Beint áðrenn eitt flogfar hjá United Airlines skuldi fara á flog úr London sunnudagin, bleiv stýrimaðurin tikin, tí løgreglan í floghavnini hevði illgruna um, at hann hevði kenning. Tann 44 ára gamli maðurin, sum var komin at sita í flogfarinum, fekk boð um at blása í ballónina, og tað vísti seg, at hann hevði drukkið í meira lagi. Maðurin er latin leysur, men hann hevur misti starvið, og tann 14. januar skal hann í rættin, sigur BBC.

# Framvegis einki nýtt um Kim Jong-il

**Í tveir mánaðir hevur eingin sæð nakað til norðurkoreanska leiðaran, og gitingarnar eru nógvar**

- Vit hava eingi tíðindi viðvíkjandi heilsuni hjá formanninum, og alt er, sum tað plagar at vera, sigur norðurkoreanski embætismaðurin Ho-nyeon sambært Reuters. Hann sigur, at teir almennu fjølmiðlarnir hava sítt fasta tilfar, og at heimlig og millumtjóða tiltøk verða avgreidd sum vanligt.

Men tað er ein sannroynd, at tann 66 ára gamli norðurkoreanski leiðarin hevur ikki víst seg alment síðani í august, og tað hevur elvt til nógvar gitingar. Seinasta leygardag skrivaði tað størsta blaðið í Japan, at ein kunngerð var á veg úr Norðurkorea, og at sambært henni er Kim Jong-il deyður ella koyrdur frá.



*Kim Jong-il er ikki sæddur alment síðani tann 14. august*
*Mynd: Reuters*

Men tey tíðindini avsannaðu vælvitandi keldur í Beijing í gjár. Kinesisku keldurnar siga, at tosið um kvett í Norðurkorea ella at Kim Jong-il er deyður, er tann beri heilaspuni.

Tað var tann 14. august, at Kim Jong-il seinast var at síggja alment, og tað vakti stóran ans, at hann var ikki hjástaddur, tá Norðurkorea hátíðarhelt sín 60 ára dag tann 9. september.

Kim bleiv tilnevndur eftirmaður hjá pápa sínum, Kim il-Sung, longu í 1980, og hann hevur sitið við valdið síðani 1994. Alment er eingin tilnevndur at taka við eftir hann. Summi vænta, at tað verður ein av teimum trimum synunum, sum hann eigur, men onnur vænta, at tað verður svágurin Jang Spngtaek. Ein møguleiki er, at ein av teimum máttmiklu generalunum tekur við.

## STUTT SAGT

### Googlestjórin styðjar Obama

Eric Schmidt, sum er forstjóri í fyritøkuni Google, fer í vikuni at kunngera, at hann vil hava Barrack Obama til amerikanskan forseta. Tað skrivar blaðið Wall Street Journal. Eric Schmidt sigur við blaðið, at avgerðin hevur einki við Google at gera, og at fyritøkan framvegis er óheft undir valstríðnum.

Wall Street Journal skrivar, at væntandi fer Eric Schmidt at kunngera sín stuðul til Obama, samstundis sum aðrir amerikanskir vinnulívsleiðarar fara at gera tað sama. Blaðið nevnir tó einki um, hvørjar aðrar vinnulívsleiðarar talan er um.

Google-stjórnin hevur annars boðað frá, at hann verður hjástaddur, tá Barrack Obama fer at halda røðu á veljarafundi í Florida í kvøld.

### Verður ikki koyrdur úr Danmark

Annar av teimum báðum tunesisku monnunum, sum eru dømdir fyri at hava havt ætylanir um at myrða danska teknaran Kurt Westergaard, verður ikki koyrdur úr Danmark, sum ætlanin annars var.

Hinmaðurin fór sjálvboðin úr Danmark fyri nøkrum vikum síðani, sigur løgreglan við DR-kringvarpið.

Maðurin varð tikin í februar saman við einum øðrum manni av tunesiskum uppruna, og myndugleikarnir gjørdu av at koyra hann av landinum. Men nú hava teir myndugleikarnir, sum umsita flóttafólkamál, gjørt av, at maðurin kortini sleppur at verða verandi í Danmark. Grundgevingin er, at tað er ov vandamikið at senda mannin aftur til Tunesia.

Ístaðin fyri útvísing fær maðurin tað, sum danir rópa „tålt ophold", og sum ber í sær, at hann sleppur at veraq í Danmark, men at hann fær ikki somu rættindi sum onnur fólk har. Eitt nú sleppur hann ikki at arbeiða, og hann skal við jøvnum millumbilum seta seg í samband við løgregluna.